**10 TING UM**

# Lars Løkke Rasmussen

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# 20.000 Facebook-vinir

HER KANST TÚ LESA EITT SINDUR UM DANSKA **FORSÆTISRÁÐHARRAN** VIÐ **FØROYSKU** KONUNI

**1** Løkke varð føddur í Vejle, og fyrr í ár kundi hann halda sín 45 ára føðingardag.

**2** Í september í 1994 var hann valdur í Fólkatingið fyrstu ferð, og frá 1998 til 2001 var hann amtsborgmeistari í Frederiksborg Amti.

**3** Løkke kom fyrstu ferð í eina danska stjórn í 2001. Hann hevur virkað sum ráðharri í innríkismálum, heilsumálum og fíggjarmálum, áðrenn hann í apríl í ár tók við sum forsætisráðharri í Danmark.

**4** Hóast hann hevur sama eftirnavn sum báðir undanmenninir hjá sær í forsætisráðnum, er hann ikki í familju við Poul Nyrup Rasmussen ella Anders Fogh Rasmussen.

**5** Løkke er giftur við Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen, og tey eiga trý børn – Bergur, Lisa og Símun. Familjan býr í Græsted. Føroysku ættarbondini hjá familjuni hava gjørt, at Løkke javnan hevur ferðast í Føroyum.

**6** Lars Løkke Rasmussen er 41. stjórnarleiðarin í Danmark, og hann er tann 21., sum kann kalla seg forsætisráðharri.

**7** Løkke hevur fleiri ferðir við í andglettinum í Danmark, tí hann skal hava latið tað almenna goldið fyri útreiðslur, sum hann sjálvur skuldi goldið fyri. Ein gjøgnumgongd av hansara útreiðsluskjølum hevði við sær, at hann betalti ein nakrar upphæddir aftur ella lat tey til vælgerandi endamál.

**8** Í 1983 tók hann studentsprógv á Helsinge Gymnasium, og í 1992 gjørdist hann cand. Jur. á lærda háskúlanum í Keypmannahavn.

**9** **Mær dámar væl skerpikjøt, ræstan fisk og annan føroyskan mat, men mær dámar best tann matin, sum eg sjálvur geri, segði Lars Løkke Rasmussen fyrr í ár við Rás2.**

**10** Løkke er virkin á eitt nú Facebook og Twitter, har hann javnan dagførir sín profil. Hann hevur meira enn 20.000 vinir á Facebook, og teirra millum eru nógvir føroyingar.

## SITAT



*Góðir vinir kunnu gera alt saman, men bara teir bestu vinirnir kunnu gera einki saman.*

***Palli Pumm***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Tórnroos

## MIÐLARNIR OG EG



í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.

DICK TURPIN, HEMINGWAY OG PINK FLOYD ERU MILLUM FAVORITTARNAR HJÁ RITSTJÓRANUM OG BÓKAVØRINUM **ARNBJØRN DALSGARÐ**.

**MÍTT BLAÐ - DAG OG VIKUBLAÐ**
Information og Weekendavisen. Og vikuskiftisútgávurnar av Sosialinum og Dimmalætting.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Fyrst og fremst http://www.sleipnir.fo/obg/fob/fob.php (Føroysk orðabók) og http://www.sprotin.fo (Orðabøkur Sprotans). Google og Wikipedia slepst ikki uttan um sum leitiamboð, men skal eg hava álítandi tilfar á netinum, brúki eg aðrar heimasíður, so sum www.flb.fo/ebi og www.flb.fo/etilfeingi.



**MÍN TÓNLEIKUR**
Pink Floyd, Leonard Cohen, Whitney Houston, Bruce Springsteen, Lars Winnerbäck og Maria Mena. Mozart og Bach, tá tað skal vera klassiskt.

**MÍN DVD**
Coffee and Cigaretts, Il Postino og Dead Man Walking.

**MÍTT MAGASIN**
New York Times Book Review, Paris Rewiev, Outsider Magazin og Vencil. Og so Rákið, sjálvandi.

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Dick Turpin og Matador. Orki ikki fyri sjónvarpsrøðum.



**MÍN BÓK**
Topp 1000? Don Quijote toppar. Hungur hjá Hamsun og Gamli maðurin og havið hjá Hemingway eru eisini smáar perlur. Og so allar prosabøkurnar hjá Raymond Carver.

**MÍTT ÚTVARP**
Bok i P2 (NRK) og Biblioteket i Kulturradion (Sveriges Radio). Eygsjón er eisini ein fín nýggj sending í KvF.



**MÍN TELEFON**
Sony Ericsson C905 - men hevði tað ikki verið fyri góðskuna á myndatólinum, hevði eg langt síðan havt fingið mær eina iPhone.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA TÍÐ UPPÁ?**
At lurta eftir og lesa tilfar hjá fólkum, sum onki siga.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
At tey flestu, sum framleiða tilfar, hava so grunna vitan og av tí sama ikki kunnu perspektivera. Og so hasar longu sendingarnar í útvarpsrásunum við ongari skrá, har vertirnir alla tíðina eru í fokus. Tær gera, at eg ikki tími at lurta eftir føroyskum útvarpi.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Upplýsandi tilfar, sum fyriheldur seg kritiskt til alt, og sum snýr seg um viðurskifti, sum gera mun. Nógv meira tilfar um mentan, list og vísindi í bæði sjónvarpi, útvarpi og bløðunum, tí eg veit, at tað eru lutfalsliga nógv fleiri fólk í føroyum, sum hava áhuga fyri tí enn fyri ítrótti og poppi.